## 80 deyð av bilbumbu

Ein sterk bilbumba, sum brast á einum sølutorgi í pakistanska býnum Peshawar í morgun, hevur kravt minst 60 mannalív. Franska AFP-tíðindastovan skrivar, at næstan øll eru sivilfólk. Torgið, har bumban brast, er vanliga fult av fólki, sum keypa mat og klæðir, og soleiðis var eisini í morgun. Eingin hevur átikið sær ábyrgdina av atsóknini, men pakistanskar keldur halda, at tað var Taliban, sum skipaði fyri. Álopið var kanska eisini ætlað sum ein ávaring til USA, nú Hillary Clinton, uttanríkisráðharri, er í Pakistan og tingast við leiðararnar har.



## Irak hevur kjarnorkuætlanir

Hóast kjarnorkuútbúnaðurin í Irak bleiv bumbaður í sor undir tí fyrra Flógvakrígnum, hava irakar ikki slept ætlanini um at gerast kjarnorkuveldi. Tað skrivar bretska blaðið The Guardian. Blaðið veit at siga, at irakska stjórnin hevur spurt seg fyri í Fraklandi, um franski kjarnorkuídnaðurin kann hjálpa irakum at umvæla ein av teimum oyðiløgdu reaktorunum. Blaðið veit eisini at siga, at irakska stjórnin er í ferð við at kanna, hvussu landið kann seta ein reaktor í gongd uttan at bróta ST-samtyktirnar, sum forða landinum at fáa sær kjarnorku.

# Sálarligir trupuleikar hjá fólki við menningartarni

**Týskvøldið, 3. novembur kl. 19.00, fer sálarfrøðingurin Annette Løwert at halda fyrilestur fyri avvarðandi hjá menningartarnaðum við sálarligum trupulleikum**

TÍÐINDASKRIV
*Psykiatriski depilin og Javni*

Psykiatriski depilin arbeiðir við at styrkja um viðgerðartilboðið til fólk við menningartarni, ið eisini hava sálarligar trupulleikar. Í hesum sambandi kemur danski sálarlæknin Anette Løwert aftur á vitjan í Føroyum at halda fyrilestur fyri avvarðandi hjá menningartarnaðum við sálarligum trupulleikum. Endamálið við fyrilestrinum er at geva fólki meira kunnleika um evnið.

Anette Løwert hevur drúgvar royndir. Hon er sálarlækni, kliniskur sexologur og rithøvundi. Hon hevur seinastu 17 árini arbeitt innan økið, m.a. sum yvirlækni í fyrrverandi Vejle Amt. Hon situr harumframt í ymsum ráðum og nevndum, sum hava havt við hesi viðurskifti at gera.



*Anette Løwert*

Hon hevur undirvíst bæði í psykiatri og sexologi fyri sjúklingum, avvarðandi og fakfólkum í Danmark, Noregi, Grønlandi og eisini í Føroyum.

Anette Løwert hevur skrivað tríggjar bøkur. Nýggjasta bók hennara er “Hans Peter har også en sindslidelse” Bókin er greið og løtt at lesa og gevur innlit i ymsu sjúkurnar og eyðkeynni teirra. Sum uppslagsbók hjá avvarðandi, er hon sera hent.

Anette Løwert hevur verið knýtt at Psykiatriska depilinum sum konsulentur seinastu trý árini. Umframt at veita fakliga vegleiðing, hevur hon havt skeið við starvsfólki, ið starvast innan økið.

Fyrilesturin fyri avvarðandi er ókeypis. Javni og Psykiatriska depilin skipa í felag fyri fyrilestrinum.

Fyrilesturin verður í Miðlahúsinum týsdagin 3. november kl. 19.00.

# Altjóða ráðstevna um havið

TÍÐINDASKRIV
*Uttanríkisráðið*

Gjøgnum tíðarinnar morgun hevur havið givið okkum stórar avbjóðingar og tikið okkara kæru frá okkum. Samstundis er havið okkara lívsgrundarlag og samband til umheimin. Havið er okkara lagna.

Soleiðis byrjaði Jørgen Niclasen, samstarvsráðharri í norðurlandamálum, í gjár røðu sína undir ársfundinum hjá Norðurlandaráðnum, sum er í Stokkhólmi í hesum døgum.

Føroyar hava tikið stig til, at havið verður ein av yvirskriftunum í norðurlendska samstarvinum, sum Danmark hevur formansskapin fyri í 2010. Sambært uttanríkisráðharranum er orðaskiftið um avleiðingarnar av veðurlagsbroytingunum í norðuri ofta merkt av vantandi tilvitan um, at vit eru nøkur, fólk, sum liva av havinum. Talan er um annað enn eitt stórt hav, ið skal verjast. Norðurlond mugu í felag vísa umheiminum, at hesi øki og havið millum tey, er grundarlagið fyri lív og virksemi hjá fólkunum, sum búgva her.

Í hesum sambandi vera Føroyar vertir fyri altjóða ráðstevnu á politiskum stigi við heitinum Seas the Future. Málið er at styrkja norðurlendska samstarvi um havið.

Vit vita, hvat tað vil siga, at vera fullkomiliga tengd at havinum. Vit í Norðurlondum hava tí allar fortreytir fyri at standa saman í altjóða samfelagnum sum havsins sendiharrar. At standa saman um at tryggja okkara og heimsins spískamar... komið til Føroyar og takið framtíðina og tað hav av møguleikum, sum vit standa yvirfyri.

Við hesum orðum endaði Jørgen Niclasen, samstarvsráðharri, røðu sína og bjóðaði øllum at vera hjartaliga vælkomin til ráðstevnuna um havið, sum verður í døgunum 5. til 7. oktober 2010.

Fyrsta høvi at varpa ljós á havið verður ST veðurlagsráðstevnan í Keypmannahavn í desember. Tá verða Føroyar vertir fyri einum sokallaðum ”side event” um havið og veðurlagið.

## Dánjal á Loppen

TÓNLEIKUR
*Barbara Holm*
*barbara@sosialurin.fo*



Fløgan hjá Dánjali “The Palace” kom út í Danmark í mars í ár, og hevur fingið sera góð ummæli í teimum norðurlondsku miðlunum. Nú verður tann seinasta konsertin á hesum sinni.

Tann góða móttøkan hevur havt við sær at Dánjal hevur verið nógv á palli seinastu tíðina.

Dánjal hevur seinasta árið verið á fleiri konsert ferðum og spælt á nógvum festivalum bæði í Danmark, Týsklandi, Svøríki, Finlandi og Føroyum.

Nú er ætlanin at fara undir at skriva nýtt tilfar, og tí heldur Dánjal ein lítlan steðg.

Seinsta konsertin á hesum sinni verður á Loppen á Christiania í Keypmannahavn. Her verður eisini møguligt at hoyra nýtt tilfar.

Konsertin verður í morgin, 29 oktobur, klokkan 21.00.

## »Lond« heldur enn »øki«

POLITIKKUR
*Barbara Holm*
*barbara@sosialurin.fo*

Útnorðurráðið eggjar staðiliga til, at man á heimasíðunum hjá Norðurlandaráðnum og Norðurlendska Ráðharraráðnum ikki longur nýtir orðingina ”lond og sjálvstýrandi øki”, um limalondini. Í staðin verður eggja til at nýta heitini ”tjóðir og lond”, ”ríki og lond” ella ”tjóðir og sjálvstýrandi lond”, soleiðis at orðið ”land” ikki verðu nýtt soleiðis, at tað útilokar Føroyar og Grønland. Hetta kom fram í ársins Norðurlandaráðsfundi, sum varð hildin í Stokkhólm.

Formaðurin fyri Útnorðurráðið, Josef Motzfeldt sigur soleiðis:

”Ráðið metir tað verða skeivt fyri Føroyar og Grønland, at orðið ”land” einans verður nýtt um sjálvstøðugar tjóðir. Okkara niðurstøða er, at Føroyar og Grønland meta sjálvi, at tey eru lond, har fólki hevur stórt samband við aðrar tjóðir, men sum til eina og hvørja tíð kann velja at fara úr hesum sambondum og gerast sjálvstøðugar tjóðir.” Segði Josef Motzfeldt, ið mælti til at taka eina politiska avgerð um at fremja hesa broytingina.